

*– Eg havi spurt, hví tey ikki fara til Syðrugøtu, har alt gongur fyri seg. Onkuntíð er svarið, at tað er so nógv stuttligari á tjaldingarplássinum, sigur Árant Hansen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**... sjálvt um vit búgva beint oman fyri tjaldingarøkið, merkja vit ikki tað stóra til, at so mong fólk savnast her...**

ÁRANT HANSEN

á tjaldingarplássinum. So, tað er eingin ivi um, at tjalding rættiliga er vorðið ein týðandi partur av hugnanum í samband við hetta stóra tiltak, sigur hann.

Árant Hansen veit eisini um, at familjur við børnum hava havt tjaldingarpláss, og hann veit at siga, at tá verður skipað so fyri, at hesi pláss liggja eitt sindur fyri seg og nakað burtur frá hinum øllum.

### Hugnaligt kvøld

Spurdur, hvussu tey annars fara at halda G! Festivalin, siga Árant og Kirstin, at tey fara at hava okkurt inni aftur við einum drekkamunni og kanska ein náttúrðabita, um onkur kemur á gátt.

– Vit fara eisini ein túr til Syðrugøtu leygarkvøldið og fara annars at heilsa upp á familju og práta við fólk, vit møta á leiðini. Hetta er eitt hugnaligt kvøld, eru hjúnini, Árant og Kirstin Hansen, samd um.

*vilmund@sosialurin.fo*




**JÓN OG KRISTFRÍÐ**

*Høvuðspersónurin aftanfyri G! Festivalin er Jón Tyril, og samskipari av stóra tiltakinum er Kristfríð Tyril*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 1950 FÓLK Í TJALDI VIÐ GØTUGJÓGV

**TVEY BOND - Fólk, sum koma á tjaldingarøkið, skulu bæði hava band til tjalding og festivalin, tí tað eru bert fólk, sum hava atgongd til festivalin, sum kunnu búgva í tjaldi og soleiðis hava atgongd til økið, sigur Kristfríð Tyril, samskipari av G! Festivalinum**

Vilmund Jacobsen

Stórur eftirspurningur hevur verið eftir tjaldingarplássum til G! Festivalin hesaferð, og fyriskipararnir hava havt bíðilistar við fólki, sum ynskja sær tjaldingarpláss.

– Vit meta, at pláss er fyri 500-600 tjøldum og hava soleiðis roknað út, at pláss verður á økinum fyri umleið 1950 fólkum.

Tað sigur Kristfríð Tyril, sum er samskipari av G! Festivalinum.

Mánakvøldið, tá vit tosaðu við hana, var tó torført hjá henni at siga ítøkiliga, hvussu fór at verða við tjaldingarplássi til øll tey, sum hava biðið um pláss – og tey, sum standa á bíðilista.

– Hetta veldst eisini um, hvørt onkur hoppar frá og um fólk, sum vilja verða á tjaldingarplássinum, ætla at hava tjald við sær ella ikki, sigur hon.

### Betri skipan

Kristfríð vísir á, at tjaldingarøkini eru betri uppmáld í ár enn onnur ár, og neyvt er ásett, hvussu økini verða skipað, eitt nú við trygdargeirum, sum er ein partur av trygdini og skipanini.

Hon sigur, at tað verður ÍF í Fuglafirði, sum kemur at taka sær av vaktarhaldinum á økinum, og talan verður um eini 70 fólk, sum eftir einari skipan koma at taka sær av hesum.

– Ein skúlaflokkur á Kambsdali kemur aftur í ár at henta fløskur og annað – og afturfyri hetta arbeiði, sum tey gjørdu so væl í fjør, sleppa tey at eiga fløskurnar, sigur Kristfríð.

Hon vísir á, at fólk, sum koma á tjaldingarøkið, skulu hava tvey bond – eitt til tjalding og eitt til festivalin.

– Tað eru bert fólk, sum hava atgongd til festivalin, sum kunnu búgva í tjaldi og soleiðis verða á tjaldingarøkinum, sigur Kristfríð Tyril, samskipari.

*vilmund@sosialurin.fo*